**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Svartkalvi. Túrur nr. 1522.**
**Tíðarskeið: 27/5 - 10/6 – 2015.**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru eisini tiknir av longu og brosmu.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Thyborøn-hurðar (til og við støð 15220020)/nýggjar Vágshurðar (restina av túrinum). Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini hósdagin 28/5 kl. 21:15 og byrjaðu at royna í vestara kanti á Munkagrunninum. Har høvdu vit eitt hál og fóru síðan suður á endan á Munkagrunninum. Síðan royndu vit í eystara kanti á Landgrunninum, norður á Fugloyartungu, vestureftir í norðara kant, og suður aftur til kaðalin. Grundlógardagin fóru vit inn at landa og skifta trolhurðar. Hesar nýggju hurðarnar eru sama slag sum tær, sum fara at verða nýttar í yvirlitstrolingini á djúpum í september. Sama dag fóru vit útaftur og gjørdu eitt stutt royndarhál, har tað var grynri enn hini hálini á túrinum. Royndu mest suðuri á endanum á Munkagrunninum, tó at vit høvdu nøkur hál í vestara kanti á Munkagrunninum. Vóru á Havnini eftir loknan túr týsdagin 9/6 kl. 11:15 og landaðu á Bacalao. Tilsamans 29 hál vórðu góðkend og gjørd upp. Veðrið var gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 10. juni 2015.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl at fáa av svartkalva, eitt vet meira enn í fjør (Talva 1), sum var eitt gott ár. Eitt vet minni var at fáa av trantkongafiski, og sama nøgd av stóra kongafiski í mun til í fjør. Meira var at fáa av upsa, brosmu, blálongu, hvítuskøtu og longu. Hóast nøgdirnar vóru smáar, fingu vit meira av toski, og sum nakað nýtt fingu vit fleiri smáfiskar. Fleiri magar vórðu kannaðir á túrinum. Føðin hjá svartkalva var í høvuðsheitum svartkjaftur, meðan tað kom fyri, at onkur einstakur hevði etið makrel ella sild. Hóast tað er ósemja um, hvussu aldur skal lesast í svartkalvanytrum, varð hetta gjørt á túrinum. Úrslitini bendu á, at svartkalvin vaks bert umleið 2,5 cm um árið, og samsvarar hetta væl við vøksturin frá merkingarroyndum. Flestu vóru millum 7 og 13 ára gamlir; svartkalvi 8 ára gamal var umleið 48 cm langur, meðan 13 ára gamal var 64 cm langur.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 1522.

| FISKASLAG | 2015 29 hál KG | Nytrur | Magar | 2014 31 hál KG | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 28220.411 | 501 | 134 | 27043.235 | 1.12 |
| TRANTKONGAFISKUR | 5613.856 | | | 7543.945 | 0.80 |
| TINDASKØTA | 4361.241 | | | 3438.477 | 1.36 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1804.996 | | | 1912.130 | 1.01 |
| UPSI | 1421.180 | 1 | 1 | 143.935 | 10.55 |
| BROSMA | 971.681 | 74 | 13 | 678.080 | 1.53 |
| BLÁLONGA | 825.918 | 5 | | 615.901 | 1.43 |
| HALAHVASSA SKØTA | 793.855 | | | 732.371 | 1.16 |
| HVÍTASKØTA | 731.425 | | | 405.427 | 1.93 |
| LONGA | 341.822 | | | 214.705 | 1.70 |
| BLÁGÓMUR | 251.903 | | | 364.568 | 0.74 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 205.808 | | | 271.610 | 0.81 |
| KLINGRUSKØTA | 161.772 | | | 55.481 | 3.12 |
| TOSKUR | 150.945 | 24 | 24 | 63.745 | 2.53 |
| SVARTKJAFTUR | 148.091 | | | 203.614 | 0.78 |
| LÁLLA | 89.757 | | | 62.401 | 1.54 |
| HAVTASKA | 58.030 | 1 | | 75.885 | 0.82 |
| LIRI | 45.825 | | | 59.855 | 0.82 |
| GULLLAKSUR | 34.670 | | | 77.654 | 0.48 |
| HVASSASPREK | 32.757 | | | 10.656 | 3.29 |
| HÝSA | 12.775 | 1 | 1 | 0.000 | |
| KALVI | 12.465 | | | 0.000 | |
| HAVMÚS | 10.563 | | | 0.000 | |
| GLÍGGJHÁVUR | 9.760 | | | 0.000 | |
| ÍSHAVSSKØTA | 9.205 | | | 17.845 | 0.55 |
| SKRAMBUL | 9.016 | | | 17.061 | 0.56 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 7.607 | | | 10.525 | 0.77 |
| LÍTLA BROSMA | 6.901 | | | 27.178 | 0.27 |
| HVÍTINGUR | 4.460 | | | 0.000 | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 3.890 | | | 0.000 | |
| SKØTA | 3.390 | | | 12.445 | 0.29 |
| ULVFISKUR | 2.021 | | | 10.354 | 0.21 |
| TUNGA | 0.735 | | | 0.000 | |
| MAKRELUR | 0.310 | | | 0.000 | |
| TANNHØGGUSLOKKUR | 0.130 | | | 0.000 | |
| RÆKJA | 0.015 | | | 0.078 | 0.21 |
| TILSAMANS | 46359.186 | 607 | 173 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í dokumentinum Tur1522d.doc.

Petur Steingrund